# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Minningarorð um Hansu Hansen

Í skrivandi stund sita vit hjúnini í lítla frítíðarhúsi okkara inni í teimum djúpu skógunum í Telemørkini her í Noregi.

Veðrið er skiftandi, men í kvøld er tað frálíkt og hugnaligt er at síggja vøkru heystlitirnar ið bera boð um at nú líðir móti vetri.

Á kvøld- og náttartíð er tað vakurt at líta at himni, har mánin og stjørnurnar kappast um at lýsa upp umhvørvið og spegla sær í vatninum beint niðanfyri.

Tíðliga í morgun visti útvarpið at siga frá, at kavin var lagstur á 1000 metra hædd, og so skjótt sum lýsti av degi sóu vit at so var um fjallatindarnar. Í sannleika er heysttíðin hugtakandi.

Vit vita at lívið er eins og árstíðirnar, og Halgabók minnir ein á, at lívstíð menniskjans er 70 ár, og 80 tá styrkin er stór.

Vit, ið eru komin upp ímóti teimum 70 árunum og har yvir, líta aftur um bak á eitt langt og fjølbroytt lívsskeið. Eins og náttúran uttanfyri, hava lívslitirnir verið ymiskir, og lívið hevur givið okkum bæði við- og mótgongd, og soleiðis hevur tað óivað eisini verið hjá okkara kæru Hansu, hon var 86 ár nú hon so brádliga fór. Hon føddist 17. juni 1922 í Havnini.

Foreldur hennara vóru Helena f. Debes av Oyri og Johannes Hansen (hjá Gynnu) úr Havnini.

Hansa var elst av sjey systkjum.

Hon fór tíðliga út í arbeiðslívið og byrjaði við at arbeiða í fiski hjá Carl á Lag.

Síðani var hon í arbeiði í nógv ár hjá Mariu Poulsen & co. P/f.

Tey síðstu 15 árini, áðrenn hon fór frá vegna aldur, arbeiddi hon í Sølubúðini Alv í miðbýnum saman við systrini Mary.

Í nógv ár var Hansa skóti og skótaleiðari í Frelsunarherinum. Søgan hjá skótunum byrjaði í juli mánaði 1939. Hansa var tá 17 ára gomul og var virkin har við lív og sál, sum man sigur.

Tað vóru Brynhild Tórsheim (gift Wasa) og Poula Hansen (gift Olsen), sum var systur mannin Osvald, ið vóru fyrstu skótaleiðarar. Hin fyrra leiðari og hin seinna kapelanur. Hansa játtaði at verða patruljuførari, men tá Brynhild fór av landinum at útbúgva seg til offiser í Frelsunarherinum, var skótaleiðarastarvið latið upp í hendurnar hjá Amy Andrésen (gift Whitehead), og Hansa tók yvir sum varaleiðari árið eftir í 1946. Tá Amy giftist og fór av landinum, vóru boð eftir Hansu at gerast leiðari.



Mong minnast vit aftur til hennara við takksemi fyri tað stóra arbeiði hon gjørdi.

Vit, ið vita um hvussu krevjandi barna- og ungdómsarbeiði er, hava stóran virðing fyri teimum, ið trúføst og stinn hava staðið í sama starvi ár eftir ár. Hansa var ein teirra, og hjartans takk skal hon hava fyri tað. Út ímóti 42 árum arbeiddi hon sum skótaleiðari, fram til 29. januar 1981.

Sum børn og unglingar kendust Hansa og Osvald. Havnin var ikki stór tá, men tey vóru betur kend við hvønn annan av tí at tey bæði vóru við í Hornorkestri Frelsunarhersins.

Í 1952 giftust tey í Havnar kirkju og búsettust í nýbygdu húsum sínum uppi á Dalavegnum.

Tey fingu børnini Gunnleyg og Óla Regin. Gunnleyg giftist við dananum Gunnari og búgva tey í Skjern á Jútlandi. Óli Regin giftist við Jenny og tey búgva í Havnini.

Ommu- og abbabørnini eru 6 og langommu- og langabbabørn 3.

Tað ið hevur sermerkt heim teirra er gestablídni og familjusamanhald.

Mangan hevur ein sitið væl hjá teimum, og vit skilja væl at tú Osvald og øll familjan sakna Hansu ómetaliga nógv. Hon hevði í sannleika umsorgan fyri allari familjuni.

Hjúnini vitjaðu okkum fleiri ferðir her í Noregi, og tað gleddi okkum serstakliga at Hansa var ein teirra ið var saman við okkum síðsta ár tá ið vit bæði høvdu serstakan dag. Hon kom hóast aldurin var høgur og heilsan ikki hin besta.

Eitt kvøldið lurtaðu vit eftir andaktini hjá Svenning av Lofti í Lindini. Konan Birgit sang so yndisliga kenda kórið: "Jesus varðveitir meg. Gjøgnum sólskin og skugga, Jesus varðveitir meg." Hesa heilsan senda vit hjúnini tær Osvaldi, og allari familjuni, við ynski um, at Harrin skal signa og styrkja tykkum øll í sorgini. Í hjørtum vára varðveita vit vakra minnið um okkara kæru Hansu.

**Erna og Njál**

# Brúkti 25.000 evrir á Tórsvølli



*Johannes Engl og Heðin Mortensen borgarstóri á býráðsskrivstovuni*

TÍÐINDASKRIV

Fyritøkan ENJO í Eystsurríki keypti lýsingarpláss fyri 25.000 euro í sambandi við fótbóltsdystin millum Føroyar og Eystsurríki á Tórsvølli leygardagin 11.oktober. Íløgan bleiv gjørd, tá eigarin Johannes Engl væntaði at umleið 1 millión sjónvarpshyggjarar í Eystsurríki vildu siggja dystin.

Sjálvur stjórin og eigarin Johannes Engl kom eisini á Føroyavitjan í hesum sambandi. Illveður varð so flogfarið varð nakrar tímar seinkað. Nógv tíðindafólk og eitt sjónvarpslið var á flogvøllinum tá flogfarið lendi. Tí umframt Johannes, sum er væl kendur bæði innan ENJO framleiðslu og innan fótbólt sum forseti fyri tað lokala felagið, komu eisini dómararnir til dystin.

Beint sum Johannes var komin á Hotel Tórshavn hevði hann ein stuttan kunnandi fund við ENJO umboðini í Føroyum. Løtu seinni var hann at hoyra á Rás 2.

Eftir útvarpssamrøðuna var farið niðan á Tórsvøll, har Johannes var vertur fyri umleið 20 gestum. Her kundu allir áskoðarar og sjónvarpshyggjarar síggja tær stórfingnu ENJO lýsingarnar rundan um nærum allan vøllin. Saman við øðrum lýsingum sóust hesar undir øllum dystinum. Men í steðginum sóðust einans ENJO lýsingarnar, sum blivu kringkastaðar til umleið 1.millión hyggjarar. Og fyri at æra okkum, sum umboð í Føroyum, hevði Johannes skipað fyri, at bæði tað føroyska Merkið og tlf.nr 314353 – www.enjo.fo sóust á lýsingunum.

Eftir dystin var opið kl 19.00 fyri almenninginum í Miðlahúsinum, har Sámal Bláhamar bjóðaði vælkomin vegna ENJO í Føroyum, og Johannes greiddi frá um ENJO framleiðsluna. Høvi var eisini at seta fram spurningar.

Beint undan fráferð úr Tórshavn 12.oktober var borgarstjórin, Heðin Mortensen, vertur fyri stuttum fundi saman við Johannes Engl á býráðsskrivstovuni. Har greiddi Johannes frá hvussu pápi hansara, Fredrik engl, hevði funnið fram til hvussu ENJO kann reinsa olju upp úr sjónum. Hetta eru trupulleikar, sum vit øll kenna til.

Á veg úr Tórshavn vísti formaðurin í Bragdinum Johannes Engl nýggju Tórsbreyt. Eina stutta vitjan í ENJO sýnishølunum í Miðbýnum í Tórshavn og á ENJO goymsluni í Tjarnarlág 41 bleiv tað eisini stundir til. Johannes Engl var væl nøgdur við umstøðurnar, sum hansara ENJO vørur hava í Føroyum.